# Strandferðslan skal viðgerast í friðartíð

**Tað verður ikki rættiliga enn, at landsstýrið fer at kanna møguleikarnar fyri at finna eina skipan so at skipini hjá Strandferðsluni ikki aftur verða rakt av arbeiðssteðgi**



*Jacob Vestergaard hevði sín fyrsta arbeiðsdag mánadagin og hann byrjaði við morgunmati saman við løgmanni og starvsfólkinum í Innlendismálaráðnum. Her er tað aðalstjórin, Rúni Joensen, sum handar nýggja landsstýrismanninum blómur*

STRANDFERÐSLA OG ARBEIÐSSTEÐGUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tað verður ikki heilt enn, at landsstýrið fer at taka stig til at kanna møguleikarnar fyri at finna eina skipan, so at skipini hjá Strandferðsluni ikki verða rakt av arbeiðssteðgum.

Bárður Nielsen, landsstýrismaður í fíggjarmálum, sigur, at í løtuni eru nógvar sáttmálasamráðingar og Landsstýrið fer ikki at taka spurningin um Strandferðsluna og arbeiðssteðgir upp, fyrrenn sáttmálasamráðingarnar eru av.

Hann sigur, at Fíggjarmálaráðið hevur einar 30 sáttmálar eftir at gera tær komandu vikurnar og hann vil hava hesar avgreiddar, áðrenn hin spurningurin verður tikin upp.

Í hvussu so er heldur hann, at tað hevur týdning, at fáa tey størstu sáttmálaøkini avgreidd. Serliga heldur hann at tað hevur týdning, at sáttmálarnir við feløgini, sum hava samband við Strandferðsluna, verða avgreiddir, áðrenn onnur viðurskifti verða tikin uppí.

Hann sigur, at sáttmáli er longu gjørdur við Starvsmannafelagið, uttan at hesin spurningurin var viðgjørdur og tí heldur hann at tað er skeivt at taka hann við í samráðingunum, sum nú eru við Skipara- og Navigatørfelagið og Maskinmeistarafelagið.

– Eg haldi, at tað er rætt at fáa sáttmálarnar frá hondini, so at spurningurin um Strandferðsluna og arbeiðssteðgir kann verða viðgjørdir í friðartíð.

Men Bárður Nielsen er ivaleysur í, at spurningurin verður tikin upp skjótt.

Hetta er ein spurningur, sum samgongan hevur tosað nógv um og tí er onki at ivast í, at hann verður tikin upp, tá ið friður verður aftur.

### Fløktur spurningur

Spurningurin um Strandferðsluna og arbeiðssteðgir er umfatandi, tí hann umfatar bæði Fíggjarmálaráðið, sum hevur ábyrgdina av sáttmálunum, vinnumálaráðið, sum hevur ábyrgdina av arbeiðsmarknaðarmálum og partvís eisini innlendismálaráðið, sum hevur ábyrgdina av Strandferðsluni.

Og júst innlendismálaráðið hevur fingið nýggjan landsstýrismann, Jacob Vestergaard. Hann er suðuroyingur og hann hevur dúgliga tosað fyri, hvussu neyðugt tað er at finna eina skipan, so at Strandferðslan ikki verður løgd, hvørja ferð arbeiðssteðgur er.

Hann hevði sín fyrsta arbeiðsdag mánadagin og hann sigur, at hann fer at hava málið í huganum og at hann fer at gera sítt til, at ein loysn fæst á málinum.

Men hvør loysnin skal vera, hevur hann onki boð upp á nú.

# Manglaði bara undirskriftin frá Jógvani við Keldu

**–Hevði Jógvan við Keldu bara sett sína undirskrift á semjuna við donsku stjórnina, hevði tað ikki verið sovorðin ruðuleiki um útlendingamálini, sum tað er nú, sigur Høgni Hoydal**

ÚTLENDINGAMÁL
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Tann ruðuleiki, sum er í útlendingamálunum, er ein ruðuleiki, sum samgongan sjálv hevur skapt.

Tað sigur Høgni, Hoydal, sum var landsstýrismaður á økinum í fleiri ár.

Nú Jógvan við Keldu varð koyrdur frá sum landsstýrismaður, var útlendingapolitikkurin nevndur sum eitt málsøki, sum lá í órøkt, men sum hann hevði fingið sett á skinnarar. Men sambært fólkaflokkinum og samgonguni, var hetta við til at slíta landsst‡rismannin so illa, at hann mátti skiftast út.

Høgni Hoydal hevur ikki annað enn eitt skeivt smíl til yvirs fyri hesi grundgevingini.

– Hetta er beinleiðis ósatt! Veruleikin er tvørturímóti, at tá ið seinasta samgonga slitnaði, var útlendingamálið sett á skinnarar.

Upprunaliga umsat vinnumálaráðið tann partin av útlendingamálunum, sum hevði við arbeiðs- og uppihaldsloyvi at gera, men familjusamanføringar hoyrdu undir løgmálaráðnum, sum nú eitur innlendismálaráðið.

### Ì tryggum hondum

Høgni Hoydal vísir á, at fyrst fekk han savnað øll útlendingamálini á einum stað undir løgmálaráðnum. Síðani fekk hann samgonguna at játta tvær milliónir eyka til umsitingina av útlendingamálum fyri at styrkja málsviðgerðirnar.

– Men tað lá alla tíðina í kortunum, at føroyingar skuldu yvirtaka økið og eg fekk eisini eina greiða avtalu við donsku stjórnina um, hvussu útlendingamálini skuldu umsitast, til tey vóru yvirtikin.

Avtalan segði greitt, hvussu umsóknir skuldu viðgerðast. Hon hevði eisini greiðar reglar fyri, hvussu mál um ólóglig uppihaldsloyvi skuldu handfarast.

Somuleiðis stóð í avtaluni, hvussu málsviðgerðin kundi gerast smidligari fyri at stytta hana.

Harafturat hevði avtalan eina serliga skipan fyri ítróttarfólk. Hetta bar í sær, at útlendsk ítróttarfólk kundu vera í starvi hjá einum ítróttarfelag. Men harafturat kundu tey hava tveir arbeiðsgevarar afturat og tilsamans skuldu tey hava eina løn, sum svaraði til eina arbeiðsmannaløn.

Høgni Hoydal heldur at hetta var ein frálík avtala.

Avtalan var liðug, men sama dag, sum hon skuldi vera undirskrivað, sendi løgmaður, Anfinn Kallsberg, landsstýrismenninar hjá tjóðveldisflokkinum til hús og útskrivaði nýval.

### *Gera mun á fólki*

Høgni Hoydal staðfestir sostatt, at tá ið hendan samgongan tók við, lógu útlendingamálini í ógvuliga tryggum hondum.

– Men síðani hevur tað verið fullkomiligur ruðuleiki á útlendingaøkinum og tað hevur ikki bara Jógvan við Keldu, men øll samgongan skyldina í.

Formaður Tjóðveldisfloksins sigur, at orsøkin til ruðuleikan, sum nú valdar á útlendingamálinum, er, at samgongan hevur álagt landsstýrismanninum í innlendismálum at umsita útlendingamálini á ein hátt, sum ikki letur seg gera.

– Jógvan við Keldu fekk boð um, at teir útlendingar, sum longu vóru í Føroyum, skuldu sleppa at verða verandi, men fleiri útlendingar skuldu ikki til landið, fyrrenn greiðar reglar vórðu gjørdar.

Høgni Hoydal sigur, at hetta er brot á allar fyrisitingarreglum tí grundarlagið undir rættartrygdini er, at øll skulu hava somu viðferð.

– Men ístaðin fyri at gera reglar, so at øll fingu somu viðferð, gjørdi samgongan eina politiska loysn, sum staðfesti, at øll ikki skulu viðfarast eins og tað er orsøkin til ruðuleikan, tí embætisfólkið í innlendismálaráðnum kann ikki umsita eftir eini politiskari loysn har øll ikki eru javntsett fyri lógini.

Hann heldur, at tað er her, hundurin liggur grivin.

– Grundarlagið má vera, at greiðar reglur mugu gerast, sum allar umsóknir skulu viðgerast eftir.

Høgni Hoydal sigur, at harafturat hendi so tað, at samgongan skarvaði tær báðarmilliónirnar, hann hevði fingið afturat til fyrisitingina í innlendismálaráðnum, av aftur, og meiri afturat, so at fyrisitingin nú er veikari enn hon var.

– Og ístaðin fyri at vit fingu avtaluna um ítróttarfólk, setti samgongan prosent á fyri, hvussu nógva løn, eitt ítróttarfelag minst skuldi betala og tað var ikki ein avtala, sum gagnaði ítróttinum.

### Kunnu yvirtakast fyri tríggjar milliónir

Høgni Hoydal mælir tí framvegis staðiliga til, at útlendingamálini verða yvirtikin.

– Verða tey ikki yvirtikin, er skipanin, sum nú er, heilt burturvið. Skulu vit ikki yvirtaka útlendingamálini, sum er heldur ongin orsøk til at umsita tey, ella ein part av teimum, sum vit gera nú. So er bara at lata donsku stjórnina umsita tey.

Hinvegin sigur Høgni Hoydal, at tað kostar ikki meiri enn tvær, tríggjar milliónir um árið at yvirtaka útlendingamálini, umframt eina eingangsútreiðslu til at gera neyðuga lógarverkið.



*– Útlendingamálini lógu í tryggum hondum, tá ið vit fóru úr landsst‡rinum, men síðani hevur hendan samgongan skapt ruðuleika á økinum. Men tað kostar ikki meiri enn tvær, tríggjar milliónir um árið at yvirtaka útlendingamálini og at gera okkara egnu lógir og treytir og tað haldi eg, at vit skulu gera, sigur Høgni Hoydal*